# Kapitalur í London fíggja privatiseringar

**– Her eru so nógvir pengar, at taðv erður eingin trupulleiki at fáa rættuliga góðan prís fyri tær almennu fyritøkurnar, vit ætla at privatisera, sigur Báður Nielsen, fíggjarmálaráðharri**



*Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri*

BÚSKAPUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

**London:** Umleið 20 umboð úr Føroyum, fyri landsstýrið, fíggingarstovnar og vinnulív vitjaðu í gjár á virðisbrævamarknaðinum í London, har bert eitt føroyskt felag er skrásett, nevniliga Føroya Kolvetni.

Eftir vitjanina á virðisbrævamarknaðinum segði Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri við Sosialin, at ein høvuðsætlanin fyri hesi vitjanini er at vita, hvussu fíggjarmarknaðurin virkar og hvussu virksemið er á kapitalmarkanðinum í einum av heimsins størstu fíggjardeplum, London.

Hetta hevur serliga samband við ætlnina hjá landsstýrinum at privatisera al mennar fyritøkur.

– Tá ið man hevur verið her í ein dag, so er nokk eingin ivi um, at tað eigur ikki at verða nakað sum helst problem at fáa ein rættuliga góðan prís fyri tær føroysku fyritøkurnar, sum vit ætla at privatisera, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri.

Seinnapartin mikudagin skuldi Bárður Nielsen halda fyrilestur fyri umleið 100 innbodnum, íleggjarum, bankafólki og fjølmiðlum. Sera stórur áhugi er fyri føroyska tiltakinum í London í mikudagin.

Týsdagin vitjaði Bárður Nielsen á oynni Man, har hann sigur seg hava finjgið sera nógv burtur.

Lesið meira um hetta í Sosialinum komandi dagarnar.

## Norðoyingar kunnu nú svimja sunnumorgun

**Klaksvík:** Frá komandi sunnudegi 22. mai fer Svimjihøllin í Klaksvík eisini at hava opið sunnumorgnar. Tað hevur leingi verið eitt ynski hjá fólki at fáa høvi at svimja sunnudagar, tá hetta sum vera man, er ein dagur, har tað liggur væl fyri hjá teimum flestu at fara at svimja. Frá sunnudegnum verður svimjihøllin so opin frá kl. 8 til 10 um morgunin og aftur seinnapartin. Í fyrsta umfari verður hetta gjørt sum ein roynd árið út fyri at vita, hvussu áhugin er. Verður undirtøkan nóg stór, kann roknast við, at hetta verður ein varandi møguleiki framyvir.

Nýggja tilboðið er ein liður í nýggju upplatingartíðunum hjá Svimjihøllini í Klaksvík, sum síggjast aðrastaðni í blaðnum í dag. Leiðslan í svimjihøllini vísir á, at tey eisini hava havt undirsjóvartunnilin í huga, nú nýggjar upplatingartíðir eru gjørdar. Tað er væl hugsandi, at tey sum koma at vitja í Klaksvík, eisini fáa hug at fara ein túr í svimjihøllina, sum jú bæði hevur barnahyl, kappingarhyl, kavingarhyl umframt sauna og solarium.

**ave**


FRĉTĉ Ĩ ARAVLOYSARI



Balslev sßkir
eftir fr²t²ĩaravloysara til Byggib¼ĩina.

Arbeiĩiĩ umfatar fyrst og fremst m§lingadeildina, og t² er taĩ ein fyrimunur um umsßkjarar hava arbeitt ² m§lingahandli, men taĩ er ongin treyt.

Annars umfatar starviĩ alt vanligt fyrifallandi arbeiĩi ² Byggib¼ĩini.

Starviĩ er t²ĩaravmarkaĩ fr§ fyrst ² juni til h§lvan august. Um t¼ heldur, at hetta er nakaĩ fyri teg, so send skrivliga ums·kn skj·tast mßguligt.

**Ums·kn verĩur at senda til:**
Pf. Balslevs Timburhandil & Byggib¼ĩ
Postboks 3309
FO-110 T·rshavn
Att: Eyĩun Hansen



Tel 31 11 22 www.balslev.fo



SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of *KPMG* International
a Swiss Cooperation

Starvslýsing

## Undirstjóri til Føroya Realkreditstovn

Fyri Føroya Realkreditstovn verður søkt eftir undirstjóra at byrja skjótast til ber.

**Um Føroya Realkreditstovn**
Virksemið hjá Føroya Realkreditstovni fevnir um útlán við veð í fiskiførum, flótandi eindum og førum í frálandsvinnu og fiskaaling við heimstaði í Føroyum.

Stovnurin verður stjórnaður av einari trímannastjórn, ið verður tilnevnd av landsstýrismanninum í Fíggjarmálum.

Á stovninum eru 2 starvsfólk, umframt undirstjóran.

**Starvið**
Undirstjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Føroya Realkreditstovni við ávísing til stjórnina.

Undirstjórin skal í neyvum samarbeiðið við stjórnina, hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av framhaldandi rakstri felagsins, herundir skipa fyri veitan av lánum og røkt av núverandi lánum.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
- hevur hollan kunnleika til vinnuøkini sum útlánini hjá stovninum fevna um og samfelagsviðurskifti sum heild
- hevur leiðsluroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f, í seinasta lagi 15. juni 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 54 34 45.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut.
revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 34 34 54
Telefax

TEAM85